ÚT AT KOYRA

# WC-Flex – ein løtt og liðilig loysn til ferðavinnuna

**Eingi kloakkrør, stórur vatntangi og wc sum kann flytast. Hetta verður ein góð loysn her hjá okkum, bæði til ferðavinnuna og hjá teimum sum skipa fyri ymiskum tiltøkum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*WC-Flex kann sleipast eins lætt og ein vanligur anhangari*

Her er ein góður møguleiki hjá teimum kommunum sum hava ætlanir um at gera nakað við ferðavinnuna. WC-FLEX er ein løtt loysn, sum kann setast upp á einum og hvørjum stað, har flestu ferðafólkini koma. Eisini er hetta eitt alternativ, og ein løtt loysn á toilettrupulleikunum, av tí at har nýtist ongin íbinding av kloakkrørum og øðrum.

## Ómakaleyst

Tey sum arbeiða í føroysku ferðavinnuni, kenna til hvat tað er at koma til eina bygd við fultsettum bussi, og onki stað hava at vísa teimum á har eitt toilet er. WC-Flex er ein góður møguleiki at loysa hendan trupulleika. Vognurin er óbundin av vatntilførslu og frárensli, tí hesi eru bygd inn í vognin við vatnskolandi toilett og handvaski við rennandi vatni. Tangan kann eigarin sjálvur tøma, og ikki er neyðugt við útreiðslum til slamsúgvara.

## 150 - 200 vitjanir

WC-Flex hevur kapasitet til 150 - 200 vitjanir millum hvørja ferð tangin verður tømdur. Vatntangarnir kunnu fyllast bæði tá vognurin stendur á hjólunum ella stendur upprættur, tað sama er við frárensltanganum. Vognurin er gjørdur úr elementum við finérplátum innan og glasfibur uttaná, eins og vatntangin og dúrkið eisini eru úr glasfibur. Tilfarið er úr góðum viðlíkahaldsfríum kvaliteti.



## Ymisk endamál

Eisini er møguleiki hjá teimum sum skipa fyri ymiskum tiltøkum at hava eitt ella fleiri WC-FLEX standandi. Tað kundi verið á Ólavsøku í Havn, á eini stevnu við Leynavatn, ella okkurt heilt annað. WC-FLEX fæst í trimum útgávum hvat útgerð viðvíkur. Áhugaði kunnu ringja til telefon 221311 ella leita inn á heimasíðuna: www.scanvogn.dk


*WC-FLEX er ein løtt loysn, sum kann setast upp á einum og hvørjum stað, har flestu ferðafólkini koma*

## WC-FLEX

| Stødd: (í koyripositión) | | Stødd: (upprættur) | |
|---|---|---|---|
| Hædd | 170,0 m | Hædd | 2,10 m |
| Breidd | 150,0 m | Breidd | 1,00 m |
| Longd | 335,0 m | Longd | 1,00 m |

| | |
|---|---|
| Eginvekt | 280 kg |
| Totalvekt | max. 500 kg |
| Dekkstødd | 155-13 |
| Tilkobling | Standard kúlukobling |

ítróttur
Nr. 62 • hósdagur • 29. mars 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# FSF vil hava Allan at halda fram



**Men Fótbóltssambandið er ikki sinnað at gera nýggjan sáttmála við venjaran fyri ein og hvønn prís**

Hóast HM undankappingin ikki er meiri enn hálvrunnin, tá føroyska ferðalagið í kvøld umvegis Frankfurt og Keypmannahavn kemur aftur til Føroyar úr Russlandi, so eru teir í Fótbóltssambandinum farnir undir arbeiðið at fáa greiðu á, hvør skal standa á odda fyri landsliðnum, tá tað í 2002 og í 2003 skal dysast í undankapping, har málið verður EM endaspælið í Portugal í 2004.

Sáttmálaskeiðið hjá Allani Simonsen verður liðugt, tá síðsti HM undankappingardysturin verður spældur í Slovenia leygardagin 6. oktober. Talan er um fjórða tvey ára sáttmálaskeiðið við Allan Simonsen. Hann hevur verið landsliðsvenjari síðani í februar 1994.

## Roknaðu við Føroyum

Í Fótbóltssambandinum verður ikki fjalt yvir, at teir eru væl nøgdir við gongdina, sum hon hevur verið tey seinnu árini, og at teir í útgangsstøðuni avgjørt einki hava ímóti, at landsliðsvenjarin í 2002 og í 2003 verður Allan Simonsen.

– Úrslitini tala fyri seg. At tað í trimum teimum fyrstu HM undankappingardystunum eydnaðist at vinna ein, spæla ein javnan, og at røkka málmuninum 5–7 boðar frá, at talan hevur verið um framgongd. Torleif Sigurðsson, FSF formaðurin, og eg vóru á fundi í Geneve hósdagin í síðstu viku. Har vóru umboð fyri øll tey europeisku fótbóltssambondini. Tað varð tosað nógv um undankappingardystirnar, sum eru á skránni nú um dagarnar. Umboðini hjá Luksemburg vildu hava onnur at halda við teimum í, at teir fóru at vinna ímóti Føroyum, men teir fingu lítla undirtøku. Úrslitið leygardagin vísti, at teir, sum ikki vildu geva Luksemburg rætt í teirra vónum, høvdu roknað rætt. Vit løgdu leiðina um Luksemburg aftur til Føroya. Eg havi ikki verið til útidyst áður, og eg má siga, at tað var hugaligt at síggja, hvussu smidliga og miðvíst alt tóktist vera, og hvussu væl skipað alt var í sambandi við landsliðið.

Eru tit komnir nakran veg í samráðingunum við Allan Simonsen um eitt sáttmálaskeið afturat?

– Tað eru vit ikki. Vit hava tosað við hann, og vit hava sagt honum, at vit undir øllum umstøðum eru sinnaðir til, at hann verður við til at loysa spurningin saman við okkum. Tá tú hevur samstarvað í átta ár, og tá tú hevur verið nøgdir, so kvettir tú ikki bara á stokkinum. Vit hava biðið Allan Simonsen lagt síni krøv á borðið, og so hyggja vit at teimum. Eg rokni við, at hetta verður tikið upp nú í vár, sigur Ísak Mikladal.

## Ikki fyri ein og hvønn prís

Tá vit spyrja, hvat skal til, fyri at talan skal verða um nýggjan venjara, svarar aðalskrivarin soleiðis:

– At halda uppat við samstarvinum, tí venjarin hevur verið so leingi hjá okkum, er eingin grundgeving í sær sjálvum. Tølini siga okkum, at talan hevur verið um framburð, og tí eigur tað ikki at koma óvart á, tá vit geva til kennar, at vit í útgangsstøðuni eru hugaðir fyri at halda fram at samstarva við venjaran. Men tað verður ikki fyri ein og hvønn prís. Áðrenn nakað meiri verður gjørt við spurningin, mugu vit kenna krøvini hjá venjaranum til framhaldandi samstarv.

Ísak Mikladal sigur, at undir øllum umstøðum vilja teir hava Allan Simonsen at vera inni í myndini, tá spurningurin verður viðgjørdur og loystur:

– Harvið sigi eg ikki, at Allan Simonsen fer at halda fram. Tað vita vit einki um enn. Men um hann ikki heldur fram, so vilja vit fegnir nýta hann sum ráðgeva, tá vit skulu seta onkran annan í sessin.

**jh**

# FSF vil hava onkran at gjalda undanvindin

‘

**Men higartil hevur tað ikki eydnast at gjørt sáttmála við nakran, sum er áhugaður í at rinda fyri hvørt stig og hvønn sigur, sum landsliðið megnar at vinna**

Í FSF hava teir Allan Simonsen fremst í huganum, nú teir arbeiða við, hvussu venjaraspurningurin skal loysast fyri komandi árini.

Í Fótbóltssambandinum eru teir ikki í iva. Glæsiliga úrslitið í Luksemburg fer at hava við sær, at áhugin millum áskoðararnar fyri heimadystunum, sum eru á skránni í summar, verður væl størri, enn hann hevði verið, um føroyingar høvdu tapt í Luksemburg. Hetta er skrivað undan dystinum í Moskva, og í Fótbóltssambandinum verður roknað við, at áhugin verður stórur fyri heimadystunum, uttan mun til úrslitið í Russlandi.

Tveir heimadystir eru á skránni undan summarfrítíðini, og tveir heimadystir eru á skránni stutt eftir summarsteðgin. Landsliðið skal spæla ímóti Sveis á Svangaskarði leygardagin 2. juni og á Tórsvølli ímóti Jugoslavia mikudagin 6. juni. Dysturin ímóti Luksemburg verður á Toftum leygardagin 1. september, og Russland skal spæla á Tórsvølli mikudagin 5. september.

At áhugin fyri landsliðnum verður størri, er einki at siga til, tá hugsað verður um, at í trimum teimum fyrstu dystunum í hesi HM undankappingini var málmunurin 5–7 í einum vunnum, einum jøvnum og einum taptum dysti. Øktur áhugi eigur at hava øktar inntøkur frá áskoðarunum og lýsarunum við sær, og tað treingir til.

## Undanvindurin kostar

Vit nevndu í blaðnum í fyrradagin, at fyri 2–0 sigurin á Luksemburg fingu spælararnir átta túsund krónur í part. Vit kenna ikki sáttmálan, sum FSF hevur við venjaran, men tað er neyvan at skjóta langt við síðuna av, um vit rokna við, at tað eisini dryppar til hansara, um úrslitini eru góð. Um vit siga, at sigurin í Luksemburg kostaði FSF upp ímóti tvey hundrað túsund krónum, so er tað neyvan fleiri ferðir tíggju túsund krónur av leið.

Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, ásannar, at tað rennur út úr kassanum, tá tað gongst væl. Aðalskrivarin hevði viljað, at tað var soleiðis skipað, at tað var trygd fyri, at tað, sum rennur út í sambandi við sigrar og javnleikir, kom innaftur beinanvegin:

– Vit kunnu rokna við, at inntøkurnar fara at økjast, tá tað gongst væl. Men tað hevði verið hugaligt, um tað var trygd fyri hesum. Í hesum sambandi hugsi eg um, at ein ella fleiri fyritøkur gjørdu sáttmála við FSF, sum var treytaður av úrslitunum. Tað kundi t. d. verið lagt til rættis soleiðis, at FSF fekk ávíst gjald fyri hvørt stigið, sum landsliðið fær. Tað mátti verið hugaligt at gjørt slíkar sáttmálar, heldur Ísak Mikladal. Hann sigur eisini, at teir onga sovorna avtalu hava.

**jh**